# GJÓGV FÆR NÝ

**SUMMARHÚS** – Eingin ivi er um, at Gjógv er millum tey mest populeru støðini at fara til um summarið, sigur Jóan Petur Vang sum býr á Norðskála. – Tí hava vit valt at fáa okkum eitt frítíðarhús júst her norðuri.



Snorri Brend

Gjógv: Enn sæst ikki nógv til ætlanina, sum komandi ár verður til ein heilt nýggjan býling ovarlaga í norðastu bygdini á Eysturoynni.

Ætlanin er í øllum førum at henda útstykkingin, nevnd Fornagarður, skal geva pláss til 16 frítíðarhús.

At fólk vilja byggja sær eitt slíkt her í Gjógv er ikki uttan orsøk. Bygdin er sera vøkur og hugnalig, og hava børnini fyrst verið her eina ferð, vilja tey heilt vist koma aftur.

Serliga um summarið er nógv lív í, tá fólk bæði búgva á Gjáargarði ella í onkrum av húsunum í bygdini. Nú er líkt til, at enn meiri lív fer at koma í, kanska longu komandi summar.

Jóan Petur Vang hevur sjálvur ikki nakað tilknýti til bygdina, men hevur verið her fleiri ferðir. Og ynskir at koma higar aftur og aftur.

– Jú, Gjógv er ein sera vøkur og hugnalig bygd, staðfestir Jóan Petur, sum til dagligt er stjóri í egnari byggifyritøku á Norðskála. – Hetta er eitt gott stað, um ein ynskir at koma burtur frá tí vanliga umhvørvinum.

## Avsíðis

Tey seinnu árini er fólkatalið við Gjógv lækkað munandi.

Í 1985 vantaði bert eitt fólk í, fyri at koma uppá 90, men síðani hevur tað bara gingið øvugta vegin. Í dag er fólkatalið soleiðis komið niður á 40.

Við nýggja býlinginum við Gjógv væntar kommunan at skapa lív og menning aftur í bygdini. Tað er kortini eitt, ið hvørki kommuna ella nakar annar nýtist at gera nakað við: Tað vakra umhvørvið.

Jóan Petur og hansara fólk hava verið kring oyggjarnar og ferðast mangastaðni. Nú er so líkt til, at tey fara at brúka nógva tíð um summarið her norðuri.

– Eg veit væl, at Gjógv liggur eitt sindur avsíðis. Men fyri okkum ger tað einki, slær Jóan Petur fast.

## 60 fermetrar

Tað munnu vera eini tvey ár síðani, at Jóan Petur á fyrsta sinni hoyrdi um hesa ætlanina við frítíðarhúsum við Gjógv.

Tá varð sagt, at ein arbeiddi við tveimum støddum av húsum. Tað vísti seg, at tey størru húsini vórðu seld so at siga beinanvegin.

– Vit vóru ikki millum teirra sum fingu eitt av hesum størru húsunum. Vit hildu eisini tá, at tey minnu húsini ikki vóru eins áhugaverd og tey størru, greiðir hann frá.

Seinni varð ætlanini kortini broytt soleiðis, at nú skuldu øll húsini hava somu stødd, nevniliga 60 fermetrar.

Hann var heppin, og fekk eitt av teimum 16 grundøkjunum, sum ein nú er farin undir at grava út fyri.

– Ja, tað verður spennandi, sigur Jóan Petur brosandi.

snorri@sosialurin.fo

**SUMMARFRÍTÍÐ**

*Útstykkingin við Fornagarð sær ikki út av nógvum í løtuni. Men gongst sum ætlað, fara tey fyrstu frítíðarhúsini at síggjast her komandi summar. - Eg eri í øllum førum spentur at koma í gongd, sigur Jóan Petur Vang, sum eigur eitt av teimum 16 húsunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*